# Landsdjóralækni og løgregla amboð og skutilsveinar

**Tað var hart stríð, tá Føroya Arbeiðarafelag var í verkfalli fyri skjótt einum ári síðini. Men formansfrágreiðingin til aðalfundin hjá FA um vikuskiftið ger greitt, at verkfallið var søguligt, tí fyri fyrstu ferð nýtti løgreglan hundar móti verkfallsfólkinum og forkvinnurnar í FA og HAK vórðu eltar av løgregluni**

FAKFELØG
*Dagfinn Olsen*

Tað var eitt slag av undantaksstøðu, tá samráðingarnar seinast endaðu við, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag fóru í verkfall. Soleiðis vil tað vera, men formansfrágreiðingin til aðalfundinum hjá FA hevur ikki rósandi orð at bera løgreglu og myndugleikum.

Ingeborg Vinther sigur m.a. í formansfrágreiðing síni:

- Sigast má,at verkfallið skrivar søgu, tí hetta er ivaleyst fyrstu ferð í Føroya søgu, at kapitalurin hevur nýtt løgregluna sum skutilsveinar og jarnbrot móti friðarligum verkfalsvaktum. Hetta varð gjørt undir verkfallinum, tá ið løgreglan kom á staðið kring landið og rak allar verkfalsvaktir til hús.

Í Kollafirði nýtti løgreglan bæði hundar og vápn, so líkt var til, at farið varð eftir stórum lógbrótarum og ikki friðarligum fakfelagslimum.

Eg sjálv, og formaðurin í HAK, vórðu eltar av løgregluni, hvørja ferð vit fóru út úr Havnini, í eina heila viku. Men málið er ikki avgreitt enn, og vit vilja hava at vita, hví løgreglan bar seg so at. Málið er kært til lokalnevndina og fer møguliga víðari, skrivar Ingeborg Vinther í frágreiðingini.

Svf visti tó mánakvøldið at siga, at meira verður ikki gjørt við málið.

### ILA sum vápn

Greitt verður í formansfrágreiðingini frá gongdini til samráðingar og við verkfall. Landsdjóralæknin átti hvønn dag rúm í fjølmiðlunum verkfallsdagarnar, tí stóri stríðsspurningurin gjørdist alingin og laksurin. Og spentari gjørdist støðan, tí ILA sjúkan hevði rakt alibrúk.

Ingeborg Vinther er tó ivaleys, tá hon ger støðuna upp.

- Verkfallið var ógvuliga hart, sum tit vita, tí tað var ógvuligt trýst á at fáa verkfalsrakt arbeiði út úr Havnini og ikki minst á alibrúkunum. Eingin okkara hevur gloymt, hvat landsdjóralæknin hevði á orði, hvussu verkfallið og tað, at vit ikki góvu undantaksloyvi til alibrúkini, skuldi gera, at ILA-sjúkan skuldi breiða seg allastaðni, tí tann deyði laksurin ikki varð tikin upp.

Sigast má, at djóralæknin var eitt hent amboð hjá mótparti okkara og í tí propagandu, hann førdi fram um tann ILA-sjúka laksin, og at limir okkara ikki fóðraðu.Vit vita, at heilar 14 dagar eftir,at verkfallið var av, var ikki ein deyður laksur tikin upp úr rakta alibrúkinum, verður m.a. sagt í formansfrágreiðingini.

# Samgongan verið óvinarlig mótvegis fakfeløgunum

**- Eingin friður hevur verið á arbeiðsmarknaðinum seinastu fýra árini, sigur Ingeborg Vinther. Hon kallar árini turbolent og sigur seg vóna, at samgongan, ið verður skipað eftir løgtingsvalið, verður til at tosa við.**
**- Samgongan hevur spesialiserað seg í at órógva og kúga fakfeløgini, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag**


*Ingeborg Vinther*

FAKFELØG
*Dagfinn Olsen*

Í formansfrágreiðing síni á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag, ið var um vikuskiftið, tykist Ingeborg Vinther ónøgd við rikna politikkin seinnu árini, tað verið seg frá landsins myndugleikum og arbeiðsgevarasíðuni.

Blaðið hevur vent sær til forkvinnuna í Føroya Arbeiðarafelag eftir eini viðmerking hesum viðvíkjandi.

- Seinastu fýra árini hava verið turbolent og eingin friður hevur verið á arbeiðsmarknaðinum. Samgongan hevur spesialiserað seg í at órógva og kúga fakfeløgini. Teir eru farnir at nýta fútaræettin, og tá er tíð at siga frá og tað gera vit eisini nú. Vit vóna undirtøku frá hinum feløgunum og fara at heita á tey, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í FA.

- Samgongan hevur verið óvinarlig mótvegis fakfeløgunum. Vónandi minnast arbeiðsfólk hetta til valið, sigur Ingeborg, ið umframt langa verkfallið, ið m.a. hennara egnu limir máttu stríðast við, eisini nevnir eina rúgvu av øðrum málum, ið hava verið seinnu árini, m.a. viðvíkjandi Lærarafelagnum, Brimli og Teistanum.

- Vónandi verður ein samgonga skipað eftir løgtingsvalið, ið er til at tosa við, sigur Ingeborg Vinther.

### Klár at taka avleiðingarnar

Og formansfrágreiðingin frá aðalfundi Føroya Arbeiðarafelags bendir á sama borð.

Sagt verður, at nevndin í FA góðtekur als ikki, at fútarætturin letur seg nýta sum amboð arbeiðsgevaranna og at felagið er til reiðar at taka avleiðingarnar av hesi avgerð.

- Vit í Føroya Arbeiðarafelag hava gjørt av, at vit undir ongum umstøðum fara at góðtaka, at fútarætturin fer at lata seg brúka sum amboð arbeiðsgevaranna í sambandi við møguligu fakligu tiltøk okkara, og vit eru til reiðar at taka avleiðingarnar, sum kunnu standast av ikki at vilja fylgja avgerðini hjá hesum fútarætti.

Vónandi taka leiðslurnar í hinum føroysku fakfeløgunum somu støðu, tí bert við at standa saman móti hesari samanrenning millum arbeiðsgevarasíðuna við fíggjarmálaráðharra okkara á odda og donsku rættarskipanina, kunnu vit forða fyri, at fútarætturin framhaldandi verður brúktur sum amboð hjá arbeiðsgevarunum, sigur forkvinnan í FA m.a. í formansfrágreiðingini.

- Í Føroyum hava vit altíð havt ta skipan, at tulkingarósemjur skulu viðgerast í gerðarrætti, og onnur mál hoyra undir vanligu dómstólsskipan okkara.

Fakfeløgini hava støðugt víst á, at tey ikki ynskja, at ein arbeiðsrættur eftir donskum leisti skal skipast í Føroyum.

Tað er ikki uttan grund,at fakfeløgini hava mótmælt, tá ið bæði tann almenni og privati arbeiðsgevaraparturin hava mælt til,at slíkur arbeiðsrættur verður settur á stovn, verður sagt í formansfrágreiðingini.

- Hóast tann parturin av Løgtinginum, sum ongantíð hevur víst virðing fyri føroysku arbeiðararørsluni, hevur roynt at fingið skipað lóggávu um føroyskan arbeiðsrætt, sum nærum er ein avskrift av donsku lógini, so hevur tað tíbetur enn ikki eydnast hesum flokkum at seta á stovn slíkan arbeiðsrætt, og orsøkin er uttan iva tann mótstøða, hetta hevur møtt í so at siga einari samdari fakfelagsrørslu, verður sagt í formansfrágreiðingini.

- Tað var tí eitt beinleiðis álop á føroysku fakfelagsrørsluna, tá ið Fíggjarmálastýrið í fjør gjørdi av at royna at brúka Fútaræettin sum arbeiðsrætt við at heita á Fútaræettin um at seta Føroya Skipara-og Navigatørfelag bann móti teimum tiltøkum, sum hetta felag hevði sett í verk í stríði sínum um sømilig setanar- og lønarkor fyri limirnar, sum skuldu sigla við Brimli.

Fútarætturin, sum er partur av donsku rættarskipanini, læt seg brúka í fakliga stríðnum og setti Føroya Skipara-og Navigatørfelag bann móti teimum tiltøkum,sum felagið hevði sett í verk,samstundis sum Vaktar-og Bjargingartænastan hevði svartalistað teir limir felagsins, sum eftir ætlan skuldu sigla við Brimli.

- Sama politiska samgonga, sum tosar um loysing frá Danmark, hevur eisini í øðrum føri brúkt danska fútaræettin sum arbeiðsrætt,og hetta vísir ta vanvirðing, sum hesir samgonguflokkar vísa mótvegis føroysku fakfelagsrørsluni og vanliga føroyska løntakaranum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tikið táttin upp og hevur eisini brúkt fútaræettin sum arbeiðsrætt í stríði sínum móti føroyskum fakfelag, sigur Ingeborg Vinther í formansfrágreiðingini frá aðalfundinum í FA.

### Gera arbeiðsbólk til verkfall

Greitt er, bæði sambært samrøðu og formansfrágreiðing, at forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag ikki metir støðuna seinnu árini vera fyrimyndarliga.

- Vit hava havt ætlanir um ein arbeiðsbólk, ið væntandi gerst veruleiki. Hesin skal setast og skal fyrireika og samskipa, tá samráðingar eru, so greitt er at fara í verkfall, skuldi tað verið neyðugt, sigur Ingeborg Vinther, ið ásannar, at tað er hart og krevjandi stríð at vera í verkfalli, tí tá leikar á frá øllum síðum.

- Umráðandi er at vera væl skipaður og at hava samband til lokalfeløgini, sigur Ingeborg Vinther, ið væntar, at eitt uppskot um slíkan arbeiðsbólk verður millum málini, ið nýggja nevndin í FA kemur at arbeiða við.

# Nýggja nevndin í FA

**Á aðalfundi í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið var millum annað nevndarval og val av næstformanni á skránni**

FAKFELØG
*Dagfinn Olsen*

Tær stóru útskiftingarnar vóru ikki til nevndarvalið á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag. Formansval verður næsta ár, men val av næstformanni var á skránni. Og hann er hin sami eftir fundin, og heldur fram.

Leila Zachariassen bar seg undan afturvali. Nevndin sær nú soleiðis út. Ingeborg Vinther, forkvinna, Georg F. Hansen, næstformaður, Marius Clementsen, nevndarl., Margretha Rasmussen, nevndarl., Harry Benjaminsen, nevndarl., Karla Einarsson, nevndarl. og Sunrid Vang, nevndarl.

Tiltakslimir eru Osmund Berg, Jan Nielsen og Hans Madsen.

Eini 135 fólk vóru á aðalfundinum hjá FA um vikuskiftið.



Olaf Olsen, reiðari um Farec-ráðstevnuna:

# Tað áhugaverda er, hví tað gongur betri hjá okkum enn hjá grannunum

**– Tá ið tað gongur betur hjá einum øðrum enn einum sjálvum, verður ofta leitað eftir umberingum, sigur Olaf Olsen**


*Kjartan leiddi ráðstevnuna hjá Farec á Hotel Føroyum*

*Vilmund Jacobsen*

Olaf Olsen, reiðari hjá P/F Beta, var ein teirra, sum fylgdi ráðstevnuni á Hotel Føroyum um kappingarføri og lønsemi í fiskivinnuni frá byrjan til enda. Saman við Havsbrún, formula fo. og Føroya Tele stuðlaði Beta eisini ráðstevnuni fíggjarliga.

Olaf hevur stóra virðing fyri tí arbeiði, sum Farec og Óli Samró hava gjørt og framvegis gera. Hann sigur, at hetta arbeiði er alneyðugt og sera týdningarmikið.

– Tað, sum Óli ger, er, at lýsa faktuellu tølini yvir fiskivinnuna sum heild, bæði á sjógvi og landi í Føroyum, Íslandi og Noregi. Hetta verður ikki bara gjørt yvir eitt ár, men fleiri ár. Kanningin hjá honum fevnir fyribils yvir árini 1998-2001, men heldur fram. Hetta eru roknskapartøl, sum lýsa gongdina. Hesi tøl kunnu samanberast millum londini, og tað er eitt gott barometur hjá okkum, sum virka í vinnuni, bæði tá ið tú liggur betur fyri enn grannarnir, men so sanniliga ikki minni, um tú liggur verri fyri. Tá kanst tú síggja, hvør munurin er, hvaðani hann stavar, og hví hesin munur er.

Olaf vísir á, at sambært kanningini hjá Farec er gongdin í føroysku fiskivinnuni betur enn hjá okkara grannum, og hetta er galdandi bæði á sjógvi og landi.

– At kappingarføri og lønsemi í okkara fiskivinnu er gott, er ikki so avgerandi í sjálvum sær, men tað, sum hevur størri týdning, er at vita, hví tað gongur betur hjá okkum enn hjá grannunum. Tá ið vit vita, hví so er, kunnu vit brúka tað til nakað, sigur reiðarin.

### Munur er

Olaf vísir á, at hóast íslendsku skipini t.d. fiska nógv meira pr. veiðiorku enn tey føroysku, so er úrslitið hjá grannunum kortini verri enn hjá okkum.

– Íslendingar hava altíð havt betur fiskigrunnar enn vit, men seinastu árini hava fiskaprísirnir í Íslandi verið nógv lægri enn í Føroyum, serliga í teimum førum, har skipini landa beinleiðis til virkini. Lutfalsliga lítil partur av fiskinum, sum íslendsku skipini fiska, fer um uppboðssølurnar, tí virkir og skip í nógvum førum eru samantvinnaði á sama hátt, sum tey vóru í Føroyum undan kreppuni.

Reiðarin vísir eisini á, at manningarhýrurnar í Noregi í miðal eru 6% lægri enn í Føroyum, tá ið hugsað verður um hýrupartin av samlaða rakstrinum.

– Og so kunnu vit spyrja: Hvussu kunnu íslendskir og norskir fiskimenn liva við, at fiskaprísirnir í Íslandi eru lægri enn í Føroyum, og at manningarhýrurnar í Noregi eru lægri enn í Føroyum, tá ið teir vita, at munur er? Eisini í slíkum førum er kanningin hjá Óla Samró kærkomin – ikki bara hjá okkum, men ikki minni hjá okkara grannum.

Olaf vísir á, at í Føroyum roynir hvørt liðið í fiskivinnuni at fáa sum mest burtur úr, og tað virkar positivt gjøgnum alla vinnuna.

### Gomul tól

– Tá ið tað gongur betur hjá einum øðrum enn einum sjálvum, verður ofta leitað eftir umberingum.

Her vísir Olaf á tað, sum íslendski bankamaðurin segði um, at kreppan í Føroyum førdi til, at okkara fiskivinna – og tá serliga framleiðsluvinnan á landi - varð sanerað og tískil gjørdist minni skuldarbundin enn tann íslendska.

– Men hetta er ikki øll orsøkin, minni enn so. Tað er rætt, at stórur partur av okkara fiskivinnu hevði eina minni skuld at bera eftir kreppuárini, men í nógvum førum vóru tólini eisini niðurslitin og eru síðan nútímansgjørd.

Olaf sigur, at umboðini fyri Ísland og Noreg, sum luttóku á ráðstevnuni, gjørdu lítið burtur úr at samanbera viðurskiftini í londunum, men løgdu størri dent á at greiða frá, hvussu viðurskiftini eru heima hjá teimum sjálvum. Hann heldur annars, at bæði norðmenn og íslendingar tóku tað nøkulunda, sum hann tekur til, at kappingarføri og lønsemi í okkara fiskivinnu er betur enn í Íslandi og Noregi.

– Eg vil siga, at bæði íslendingar og norðmenn viðgera tilfarið hjá Farec positivt, og tað hoyrdu vit eisini í útvarpinum týsmorgunin, tá ið teir róstu Óla Samró fyri arbeiðið, vísir reiðarin á.

Olaf Olsen sigur at enda, at stórur fongur er í tí arbeiði, sum Farec ger.

– Í endanum av sjeytiárunum og eini 10 ár fram tók Fiskivinnuráðið hendan táttin upp, men tíverri datt hetta arbeiðið niðurfyri. Nú kunnu vit bara fegnast um, at arbeiðið er tikið uppaftur og á breiðari grundarlagi enn áður, sigur reiðarin.


*– Bæði íslendingar og norðmenn viðgera tilfarið hjá Farec positivt og rósa Óla Samró fyri tað, hann hevur gjørt, sigur Olaf Olsen, reiðari*


*Olaf Olsen, reiðari: – Tað er rætt, at stórur partur av okkara fiskivinnu hevði eina minni skuld at bera eftir kreppuárini, men í nógvum førum vóru tólini eisini niðurslitin og eru síðan nútímansgjørd*